# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 30.09.2019 kl. 17.30

Á fundi:
Janus Thomsen
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Poul Laust Christiansen (fyri Sten Spange Larsen)
Hans Cecil Poulsen (fyri Eir J. Norðberg)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 193a og 114, Hvalba.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 193a letur umleið 2.800 m2 til matr. nr. 114, Hvalba.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

2. **Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 66a og 77, Hvalba.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 66a letur umleið 93 m2 til matr. nr. 77.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

3. **Umsókn um byggiloyvi til garð á matr. nr. 209a, Hvalba.**
   Ætlanin er at gera garð framvið Bíarvegi 106, Hvalba.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi samsvarandi umsókn og givnum upplýsingum, treytað av, at hjáløgdu treytir hjá JCJ Arccon verða fylgdar.

   Poul Laust Christivansen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 4.

4. **Umsókn um byggiloyvi til garð á matr. nr. 87v, Hvalba.**
   Bygging av garði móti landsvegnum, hevur verið til hoyring hjá Landsverk, sum umframt JCC Arccon eru komin við tilmæli.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at geva byggiloyvi til vestursíðu av garði sambært umsókn, givnum upplýsing-um og tekningum, treytað av, at bygt verður samsvarandi hjáløgdu treytum frá Landsverk og JCC Arccon.

Janus Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 5.

5. **Umsókn um byggiloyvi til útbygning á matr. nr. 390e, Hvalba.**

Ætlanin er at inniloka inngongdina á eystursíðu á bygninginum og verður søkt um byggiloyvi til hesa bygging.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at geva frávik til aftratbyggingina og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekning, treytað av, at hjáløgdu treytir frá JCJ Arccon verða fylgdar.

6. **Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 524o, Hvalba.**

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum.

7. **Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 205c og 205d, Hvalba.**

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í samsvari við hjáløgdu treytir frá Steinur Poulsen.

8. **Umsókn um byggiloyvi til neyst á matr. nr. 70, Hvalba.**

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at staðfesta byggiloyvið frá 2012, tó treytað av, at hæddin á neystinum ikki fer upp um hæddirnar á teimum nýggju neystunum á matr. nr. 80a í Nesi.

9. **Nýggj gøtuljós - kostnaðarmeting.**

Kostnaðarmeting fyri nýggj gøtuljós er umleið kr. 9.112,50 við MVG, íroknað stabbar, steyrar v.m.

**Fíggjarnevndin 27.09.2019:**

Einmælt samtykt at mæla til at keypa 10 nýggj gøtuljós í ár.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

10. **Innkomið tilboð uppá skrásetingarskipan.**

Krea / Jaspur Langgaard hava latið inn tilboð uppá skrásetingarskipan til skráseting av rottum, vatnveiting v.m.

**Fíggjarnevndin 27.09.2019:**

Nevndin mælir til at taka av hesum tilboði.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

**11. Vegforðingar í Nesi og skelting í sóknini.**

Borgarir í Nesi heita í skrivi á kommunustýrið um at fáa Nesveg innrættaðan sambært skeltingini 30 km/t og at bungur ella aðrar forðingar verða settar upp.

**Vega- og havnanevndin 22.09.2019:**

Nevndin mælir til, at Nes verður gjørt til 30 km/t øki og at vegforðingar verða settar upp á Nesvegi í samráð við Ferðslunevndina. Mælt verður eisini til, at Sandvík verður gjørt til 40 km/t øki, eins og partur av Hvalba, ið ikki er landsvegur.

**Fíggjarnevndin 27.09.2019:**

Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Innsport uppá 4 stk. vegbungur.

**Avgerð:**

Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri at gera alla sóknina til 30 km/t øki og at taka av tilboðnum frá Innsport uppá 4 stk. vegbungur.

**12. Neyst á Hamranesi til egning.**

Innkomið skriv frá borgara um loyvi at brúka neystið matr. nr. 248 til egning.

**Vega- og havnanevndin 22.09.2019:**

Nevndin mælir til, at bátaeigarir í sóknini fáa loyvi at brúka neystið at egna í, kostnaður kr. 500,00 árliga pr. bát.

**Fíggjarnevndin 27.09.2019:**

Samtykt varð einmælt at mæla til, at lýst verður á heimasíðuni um, at neystið er til leigu til egning.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum – við einari royndartíð á eitt ár.

**13. Innkomin tilboð uppá nýggjan krana á Hamranesi.**

Til støðutakan - innkomin tilboð uppá nýggjan krana til bryggjuna á Hamranesi.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini og taka av tilboðnum frá Áway.

**14. Innkomin tilboð uppá vaktarhald við Hvalbiar skúla.**

**Avgerð:**

Samtykt varð við 4 atkvøðum fyri at avtaka vaktarhaldið við Hvalbiar skúla.

**15. Innkomin tilboð uppá nýggjan ketil til Roynhøllina.**

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini og taka av tilboðnum frá Magn.

**16. <u>Innkomin tilboð uppá klæðing av skjøldrum á eystur- og norðursíðu á Hvalbiar skúla</u>.**

Til støðutakan – trý innkomin tilboð:

**Fíggjarnevndin 27.09.2019:**

Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Tommy Olsen/Birgir Toftheyggj.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

**17. <u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.35

Janus Thomsen Magni Bertholdsen Rúni Thomsen Gunnhild Mortensen

Niels Olaf Eyvindsson Poul Laust Christiansen Hans Cecil Poulsen